## Viðmerking:

# Fundamentalisma við nýggjum navni

Hví kalla seg bíbliutrúgvan? Tí tað rætta heitið er fundamentalist. Hví pakka tað inn í vatt? Skammast tit av tykkum sjálvum? Hesir fundamentalistar kalla tað, ið Paulus hevur skrivað fyri Guðs Orð. Ein skuldu trúð, at Paulus var Kristus. Fyrst leggja hesir fundamentalistar á kvinnuligar prestar. Guð hjálpi mær, nú eru tað prestar og skriftlærd, sum fáa ilt í reyvina av samkyntum. Hvørjum skal tað enda við? Í Iran missir prestastýrið tíbetur vald. Í Føroyum veksur fundamentalisman. Tað ber sjálvandi til at verða muslim ella kristin og enn hava virðing fyri samkyntum og kvinnum. Fundamentalistarnir virða kvørgi. Paulus hevði kvinnu- og homofobi. Tað er altíð skeivt at gerða missmun. Paulus var ikki Guð, tessvegna er tað, sum hann hevur skrivað ikki Guðs orð. Mær vitandi hevur Jesus ongastaðni umrøtt samkynt. Jesus segði: „Ein er leiðbeinari tykkara; Kristus“. Paulus var ikki Kristus.

Teir sum samlaðu bíbliuna løgdu størri dent á Paulus enn á Jesus. Tað sama gerða fundamentalistarnir. Paulus hevur 14 brøv í bíbliuni. Tummasar evangelium slapp ikki gjøgnum nálareygða. Tað er ringt at døma um, hvønn hesir fundamentalistar byggja á. Jesus byggja tey í hvussu so er ikki á. Tí hann dømdi ongan, heldur ikki samkynt.Tey eru kvørki minni ella størri syndarar.

Prestar hava altíð valt sær løtt offur. Tað vóru prestar, sum østu fólk og fingu tey, at jakstra jødar. Hesuferð eru tað samkynd, sum standa fyri skotum. At enda eini góð ráð til bisp, blaka hesar fýra óargaungar úr fólkakirkjuni! Prestastýri og fundamentalisma hoyra ikki heima í Føroyum. Um bispur letur standa til, so endar tað við, at vit fáa eitt

Afganistan í Norðuratlant- arhavinum. Tað er hetta, sum fundamentalistarnir vilja hava. Tað skal eingin ivi verða um tað. Kósin er set, einaferð enn ganga skriftlærd og Farisearar á odda.

**Bárður Olsen**
**Sandavágur**


## RESEPTIONISTUR
*Á HOTEL HAFNIA*

Vit sóknast eftir einum virkisfýsnum og tilkomnum fólki m/k til fast starv í reseptiónini - at byrja sum skjótast

*Umráðandi er, at tú hevur:*
- útbúgving sum reseptionistur ella hollar starvsroyndir innan reseptión-/hotelyrki
- góðar/drúgvar starvsroyndir innan samskifti og tænastu
- málkunnleika í talu og skrift - í minsta lagi enskt, umframt norrønt mál
- góðan kunnleika til teldu og tekstviðgerð

*Arbeiðið krevur, at tær dámar at:*
- arbeiða sjálvstøðugt og við skiftandi arbeiðstíðum, í einum, til tíðir, strævnum arbeiðsumhvørvi
- kenna ábyrgd fyri og taka fulla ábyrgd av tínum arbeiði
- hava fjølbroyttar arbeiðsdagar við kvøld- og vikuskiftisvaktum
- veita tænastu á høgum stigi

Skrivligar umsóknir við prógvum og ummælum skulu vera okkum í hendi skjótast tilber ella innan 9. juni 2000.

Nærri fæst at vita, við at venda sær til:
P/F Hotel Hafnia
Att: Ása Johnsdóttir
Áarvegur 4-10
100 Tórshavn
Tel 31 32 33 • Fax 31 52 50
E-mail: asa@hafnia.fo

HOTEL HAFNIA


# Opið bræv til landsstýrismannin Helenu Dam á Neystabø

*viðvíkjandi heilsuassistentum í Heimarøktini*

Vit undirritaðu, sum í mong ár hava starvast í heimarøktini, fóru til Danmarkar at útbúgva okkum sum heilsuassistentar, men heimafturkomnar eftir lokna útbúgving fingu vit at vita frá leiðsluni fyri Heimarøktini, at vit bert kundu starvast sum heimahjálparar, skuldu vit framvegis hava starv í Heimarøktini. Eingin heimild var at arbeiða sum heilsuassistentur sambært lógum og relgum frá Heilsumálastýrinum.

Higartil hava vit roynt at havt tol viðvíkjandi skerdu møguleikum okkara at arbeiða sum heilsuassistentar, men nú er tolið farið at ganga undan, og tí gera vit hesa roynd við einum opnum, almennum brævi til tygara. Lógin um almanna- og heilsuútbúgvingarnar varð lýst og kom í gildi 1. august 1999, men syndarliga seint gongur at seta hesa lóg í verk, og heimahjálpararnir noyðast at svíða fyri hetta, tí fleiri teirra vildu fegnir fingið størri førleika og vitan, tí teir hava sum er lítla ella onga fakliga útbúgving, og slíkt kann ikki berast í bøtuflaka fyri nú á døgum, hvørki so ella so.

Tað er eitt stórt og gott arbeiði, sum heimahjálpararnir hava gjørt og framvegis gera, alt síðan henda skipan varð sett í verk í 1973.

Vit væntaðu, at verandi støða kundi ikki halda fram leingi aftrat. Øll vistu, at almanna- og heilsuskúli fyri hjálparar og assistentar skuldi setast á stovn. Hetta hevur verið í umbúnað í fleiri Harrans ár, men lítið røkist fyri, at her hendir nakað.

Í einum rundskrivi frá Heilsumálaráðnum hin 19.1.1999 verða heilsuassistentar nevndir sum starvsfólk í Heimarøktini, men hin 21.6. sama ár sendir Heilsumálastýrið út nýtt bræv, ið tekur loyvið aftur at seta heilsuassistentar í starv í Heimarøktini. Grundgevingin fyri hesum er, at Heimahjálparafelagið mótmælti hesum ætlanum, og at landsstýrismaðurin í heilsumálum hevði tikið hetta til eftirtektar. Hetta er so støðan við sama lag.

Sama heilsumálastýri skal seta á stovn skúla, sum hevur til endamáls at útbúgva enn fleiri av hesum somu heilsuassistentum, ið ikki kunnu brúkast í Heimarøktini, hóast ein partur av útbúgvingini hjá hesum starvsfólkabólki júst er í Heimarøktini. Skiljið hetta, hvør ið kann. Vit hava ið hvussu so er ilt við at skilja hetta, og enn minni kunnu vit góðtaka slíka framferð. Tað skerst ikki burtur, at mannagongdin hjá Heilsumálastýrinum er í stórari andsøgn við andan í lógini.

Alsamt fleiri sambýli verða sett á stovn. Við myndugleikans signing verða miðsavnað heilt upp í 10 gomul og ofta illa sjúk fólk, sum ikki kunnu vera heima hjá sær sjálvum, men starvsfólkið, ið arbeiðir á hesum sambýlum, hevur ikki lært grundleggjandi sjúkrarøkt. Er hetta ikki ábyrgdarleyst?

Vit vita, at heimasjúkrasystir kemur at vitja í sambýlum, men hon hevur nógv onnur heim at fara í og kann ikki vera á fleiri støðum í senn. Eitt samdøgur hevur sum kunnigt 24 tímar. Vit eru fleiri, sum spyrja: Hví skal ein starvsbólkur við útbúgving haldast burtur frá heimarøktini og sambýlunum? Sum nú er tykist frægast at vera ófaklærdur til tess at fáa arbeiði í Heimarøktini. Er hetta ætlanin í framtíðini? Var ikki betri fyri øll, at fakfólk eisini sluppu framat her, eins og gjørt verður í øðrum førum innan heilsurøktina?

Heilsuassistentar eru ein væl virkandi og væl dámdur starvsbólkur innan eldrarøktina í Heimarøktini, Sjúkrahúsverkinum, í psykiatriini og á bústovnum fyri brekað og menningartarnað í Danmark í dag.

Nógv verður uttan hóvasták sett í verk her á landi bert við tí grundgeving, at soleiðis verður gjørt í Danmark. Omanfyrinevnda útbúgving kemur úr Danmark, og lógin er umsett og sett í gildi her á landi, men ikki er loyvt at seta fólk við hesi útbúgving í starv í Heimarøktini. Álvaratos, her haltar í stórum!

Okkum vitandi hevur arbeiðsgevarin leiðslurættin og ikki fakfeløgini. Um eitt nú fíggjarmálaráðharrin hevði gjørt á sama hátt og í einum skrivi ásetti, at ávísur starvsbólkur við útbúgving ikki skuldi sleppa at arbeiða innan sítt fakøki, tí okkurt hissini fakfelag mutaði ímóti og heldur vildi hava ófaklært fólk, so hevði stór gøla verið beinanvegin. Hetta hevði verið tann øvugta verð, og eingin landsstýrismaður við sínum fullu fimm hevði funnið upp á slíkt. Vit kunnu so spyrja: Hvussu ber tað til, at eitt fakfelag kann stýra landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum? Vit kunnu eisini freistast til at halda, at orsøkin kann vera, at tær báðar, sjálvstýriskvinnan, ið er formaður í Heimahjálparafelag Føroya, og Helena Dam á Neystabø, eru politiskar vinkonur, og at landsstýrismaðurin í heilsumálum arbeiðir fyri egin áhugamál ella fyri tey hjá politisku vinkonuni. Hetta líkist valdsmisnýtslu. Um so er, heita vit undirritaðu á tygum um at rudda skuffuna — ongantíð ov skjótt — og gera skil á hesum álvarsmáli. Latið ikki henda skammblett verða sitandi á Heilsumálastýrinum. Vit og nógvar aðrar bíða ótolnar eftir at sleppa til verka í Heimarøktini.

**Vinaliga,**
**Sunneva Tyril, Hervør Svalbard og Sigrid Ludvig, heilsuassistentar**

# Hví er Jóannes so stúrin

Í einari grein herfyri, royndi onkur at finna útav, hví javnaðarformaðurin tyktist heldur stúrin. Eg haldi nú ikki, at Jóannes er í verri lag enn flest onnur. Tað er ivaleyst bert tá talan er um politikk, at hann tykist heldur gronutur. Í øðrum sambandi man hann vera eins og øll onnur.

At hann er politiskt stúrin, er einki at siga hann ringan fyri. Fáur man hava meira at dragast við, enn júst Jóannes.

Javnaðarflokkurin minnur meg oftast mest um eina ítróttakapping, har nakrir í fyrstu syftu ikki hava kvalificerað seg til endaspurtin. Hesir plaga at fáa enn ein møguleika, í einum sonevndum uppsamlingsheati.

Teir, sum í dag ídnastir royna at verja flokkin, eru slíkir, sum ikki náddu á mál í fyrstu syftu.

Har eru Hans Pauli, Bergur og Rolf. Hesir nelgdu flokkin á krossin í Framanum fyri fáum árum síðan. Mótvegis teimum stóð Virgar, sum láturverji hjá Atla.



Í Fuglafirði dundrar tann ultrakonservativi sambandsmaðurin Dan. Ímóti honum stendur Jógvan Mørkøre, bygdaráðsformaðurin í Hósvík, við sínum greiðu frælsishugsjónum.

Jóannes skal eisini látast at vera væl við Nyrup, hóast skilagóðir javnaðarmenn (ikki minst Marita Petersen), fyri langari tíð síðan hava mist alt álit á manninum.

Har er Kristjan, sum skal verða pensjónstalsmaður. Einasta loysn hann higartil hevur víst á, er tá hann sum landstýrismaður á sinni legði fram Robin Hood loysnina, sum segði, at man átti at taka frá teimum ríku pensjónistunum og geva til teir fátækaru. Høgravendari enn fólkafloksmenn segði hann eisini, at vit í framtíðini ikki høvdu ráð til pensjonistarnar.

Álvaratos, er tað undarligt, at Jóannes tykist stúrin?

Hann hevur alla grund at gera tað.

Áðrenn valið í 98 vildu 30% hava hann til løgmann, og hóast hann situr í andstøðu, eru bert 15% eftir.

Í fleiri hundrað ár hevur fólk undrast, hví Mona Lisa smílist so undrunarfult. At Jóannes hevur politiska gron er ikki so undarligt. Hann veit, at tað einasta, sum bindir flokk hansara saman, er tað, sum Katrin D. Jakobsen kallar Hoydalssyndromið.

**Manne Persson**


**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**




# Í býin - altíð eitt stað at fara


**Streymoy**

STÓRT FISKABORÐ

Verið vælkomin at royna leskiliga fiskaborð okkara hvørt týskvøld og hóskvøld frá kl. 18.00

Stórt úrval av heitum og køldum fiskarættum

- og okkurt leskiligt omaná !

Bert 175,-

• Eisini bjóða vit okkara fjølbroyttu á la Carte matskrá •

Borð kann bíleggjast frammanundan.

HOTEL HAFNIA

Hotellið í miðbýnum
Tel 31 32 33

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING

v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn

TAXA

MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI

288888

FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

CAFÉ NATÚR

* * *

Staðið har vit hittast

***

Long drinks Café

CLEOPATRA

Við gongugøtuna

Opið er:

| | |
|---|---|
| Mán.– Hós. | kl. 19.00 – 23.30 |
| Fríggjadag | kl. 17.00 – 03.30 |
| Leygardag | kl. 19.00 – 03.30 |
| Sunnudag | kl. 17.00 – 23.30 |

Kaggin

Fríggjakvøldið spælir MOONSHOT

Leygarkvøldið spælir BLACK JACK

Kaggin Kaggin Kaggin

www.kaggin.fo

Sosialurin - 311820

AUTO

- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -

Skalt tú bil hýra - so er tað 311234

AUTO

BENZIN DIESEL KIOSK - ALT DØGNIÐ -

AUTO 311234

**Eysturoy**

EYDNAN á Oyrarbakka

Dansur verður leygarkvøldið 3/6

EX-RAYS spæla

EYDNAN

NÁTT-BUSSURIN hjá Øssuri Christiansen

Leygarkvøldið:

| | |
|---|---|
| • Úr Vestmanna | kl. 24 |
| • Úr Tórshavn | kl. 01 |
| • Úr Vestmanna | kl. 04 |
| • Úr Tórshavn | kl. 05 |

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

fk Matseðilin

Fríggjadagin 2. juni:
Kotelettir

Leygardagin 3. juni:
Nakkakambur

Mánadagin 5. juni:
Stongt

Týsdagin 6. juni:
Grýturættur

Mikudagin 7. juni:
Bankikjøt

Kostnaður 30,- kr.

***

Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 19,95

Matstovan í Hoyvík

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

Í BÝIN

Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum

sosialurin


**Vilja tygum vi› í**

***Í b‡in*** **- hvønn hósdag**

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur